# Føroyar eru fyri allar føroyingar.



Tað, ið Fólkaflokkurin stendur fyri, er ikki broytt seinnu árini. Hóast mangan baldrut í landsbúskapi og innan tinggáttar, halda vit kósina og fara siðiliga, men áhaldandi at arbeiða fyri at røkka longu settum málum.

Fyri at røkka málunum skal vinnulívið hava tryggar og støðugar karmar í einari samfelagsskipan, har eitt sterkt almanna- og heilsuverk og góðir útbúgvingarmøguleikar eru natúrligir partar av gerandisdegnum. Í hesum samfelag skulu føroyingar sjálvir ráða og skapa framburð. Vit skulu tí virka fyri at fáa ein sjálvberandi búskap og harvið gjalda har, sum vit valda.

Tað almenna skal verja frælsið hjá tí einstaka, so hann undir persónligari ábyrgd kann røkka sínum lívsmálum. Tann einstaki føroyingurin skal hava frælsi og rásarúm til sjálvur at leggja sær lívið til rættis eftir evnum og hegni. Við atliti at lívsgóðskuna hjá tí einstaka skulu vit virðiliga hjálpa teimum, ið ikki sjálvi megna tað.

Vit skulu stremba eftir at skapa varandi karmar fyri einum fjøltáttaðum vinnulívi soleiðis, at leggjast kunnu langtíðar ætlanir, ið skapa íløgutrygd. Vit skulu styrkja kappingarførið hjá vinnulívinum við at tillaga skatta- og avgjaldstrýstið.

Eg fari sum formaður floksins at heita á teg um at taka væl móti valevnum okkara og velja ein sterkan Fólkaflokk inn á Føroya Løgting.

Anfinn Kallsberg

XA
FÓLKAFLOKKURIN
*- Ábyrgd, álit og áræði*



# Málsøkin og stevnufastur

Fólkaflokkurin verður eftir valið bindiliðið í eini komandi samgongu. Tí er tað av størsta týdningi at Fólkaflokkurin fær dygga undirtøku frá veljarunum tann 20. januar.

Málið er at røkka eina samgongu – helst eina breiða samgongu – sum er før fyri at finna loysnir, ið kunnu tryggja góða tænastu til allar samfelagsbólkar - tað verið seg ung sum gomul.
Trygdin undir hesum er, at vit eiga eitt gott, fjølbroytt og sterkt vinnulív.

Týðiligt er, at flokkar bæði á sambandsvonginum og á vinstravonginum hava ognað sær partar av stevnuskrá Fólkafloksins, ásannandi, at ongin skilagóð samgonga verður skipað uttan um Fólkaflokkin.

Ongin fær øll síni áhugamál nøktað í eini samgonguavtalu. Hetta vita vit, og eiga vit tí bæði viljan og evnini at søkja neyðugar politiskar semjur.

Tó er óhugsandi, at ein komandi samgonga, har Fólkaflokkurin er við, sær dagsins ljós uttan :

- at vinnan fær tryggar og góðar karmar at virka undir
- at einskiljing av almennum fyritøkum gerst veruleiki
- at sjálvstýristilgongdin heldur fram
- at yvirtøkulógin ella "Tvøroyraskjalið" verður samtykt

Málsøknir og stevnufastir bjóða vit okkum fram. Fólkaflokkurin vil menna vælferðarsamfelagið - eisini sjálvt um búskapurin "sveiggjar" nakað skeiva vegin.

Allir búskapir í heiminum hava tað betri og verri og havandi í huga, at vit eru eitt av ríkastu londum í heiminum, eiga vit ikki at lata okkum ræða til stemmukassarnar av hesi orsøk.

At duga at stýra einum samfelagsbúskapi umfatar eisini at duga, tá tað gongur minni væl.

Hetta vita vit, og hetta duga vit.

Fólkaflokkurin er størsti garanturin fyri, at sjálvstýristilgongdin heldur fram. Tí eiga tey, sum taka undir við tilgongdini, at stuðla Fólkaflokkin tann 20. januar. Tá er vissa fyri at atkvøðan fer, har hon ger størstu nyttuna.

Poul Michelsen
www.poulmichelsen.fo

XA
FÓLKAFLOKKURIN
*- Ábyrgd, álit og áræði*





# Her eru 44 C vitaminir

## Norðurstreymoyar valdømi



Eddie Hjartvard Joensen, Gunnvá Mortensen, Hans Pauli Strøm, Soffi Egholm

## Norðoyar valdømi



Eyðgunn Samuelsen, Jákup á Fløtti Jacobsen, Jógvan Páll Poulsen, Mamy Dahl Sørensen, Torleif Sigurðsson, Tummas Lervig, Vilhelm Johannesen

## Suðurstreymoyar valdømi



Bergur Dam, Bjarki Mohr, Elin Lindenskov, Helena Dam á Neystabø, Jan Poulsen, Joan Ziskason, John Johannessen, Katrin Dahl Jakobsen, Kári Mortensen, Kristian Magnussen, Sophus Dal-Christiansen

## Eysturoyar valdømi



Andrias Petersen, Dan Reinert Petersen, Edvin Joensen, Jancy Olsen, Rúni Poulsen, Sunleiv Højgaard, Sylverius Jacobsen, William Max Hansen

## Vága valdømi



Edvard Joensen, Kristoffur Gaardlykke, Rasmus Niclasen

## Sandoyar valdømi



Birgir Mohr, Eyðstein Dalsgaard, Gerhard Lognberg, Tummas Frank Joensen

## Suðuroyar valdømi



Henrik Old, Jastrid Nielsen, Jóannes Eidesgaard, Mikkjal Sørensen, Nita Næs, Rúni Lisberg, Sverre Midjord

# Minst til at eta sunt!

JAVNAÐARFLOKKURIN
*- nakað fyri T*